Fleyr-Mjølnir 1-3 (23-25, 25-23, 25-27, 21-25):

# Mjølnir upp á bronsuplássið

**Við Trúgva Poulsen á odda vann Mjølnir 3-1 móti Fleyr, sum sostatt tapti fyri triðju ferð á rað. Vónirnar hjá Mjølni eru nógv betri nú enn fyri bara einum mánaði síðani**

FLOGBÓLTUR, MENN
*Emil Lisberg Jacobsen*

Menninir hjá Fleyr byrjaðu kappingina væl við at vinna 3-0 móti ÍF á Kambsdali. Men síðani tá hevur tað ikki gingið væl í hond. Eftir ósigrar móti SÍ og Fram taptu teir fyri triðju ferð á rað, hesaferð móti Mjølni, sum hinvegin spældi sín klárt besta dyst higartil í kappingini.

Mjølnir vann 3-1 í einum sera jøvnum og spennandi dysti, har tapandi liðið í øllum settunum kom uppum 20.

## Trúgvi skaraði framúr

Tvey tey fyrstu settini endaðu 25-23, tað triðja endaði 27-25, og fjórða sett vann Mjølnir 25-21.Vónirnar til Mjølnir hava ikki verið serliga stórar í ár. Tað hevur verið tosað meir um Fram og serliga SÍ. Men um Mjølnir kann halda fast við spælið, teir vístu í Gundadalshøllini leygardagin, kann tað gerast sera áhugavert.

Leygardagin var tað serliga Trúgvi Poulsen, sum gekk undan. Klaksvíkingar siga, at vit skulu langt aftur í tíðina fyri at finna ein dyst, har Trúgvi hevur spælt so væl, sum hann gjørdi leygardagin - hann skaraði framúr bæði frammi við netið og niðri á gólvinum.

Móti endanum av dystinum kom John Syderbø á vøllin. Hann hevur leingi verið skaddur, men gjørdi tað gott ta løtuna, hann var inni, og tá hann kemur í fulla venjing, verður Mjølnir enn betur fyri. So spádómarnir um, at Mjølnir fer at fáa tað trupult í ár, verða kanska gjørdir til skammar.

Mjølnir tók fyrsta sett 25-23 og í øðrum setti vóru teir eitt skifti frammanfyri 23-17. Men so tók Fleyr sær um reiggj og vann settið við somu tølum, sum Mjølnir hevði vunnið tað fyrsta: 25-23.

Í triðja setti var støðan so tann øvugta. Fleyr var á odda 23-19, men Mjølnir vann settið 27-25. Og eisini í fjórða setti var Mjølnir drúgvari og vann 25-21.

## Uttan útlendingar

Tað hevur verið nógv tosað aftur og fram um útlendingarnir, sum eru í føroyskum flogbólti. Í fjør var Borko Ilic leikandi venjari í Klaksvík, men í ár hevur Mjølnir ongan útlending á liðnum. Og sjálvt um Borko sjálvandi er ein missur á vøllinum, so er tað ikki óhugsandi, at missurin verður uppvigaður aðrastaðni. Í øllum førum skilst á klaksvíkingum, at tað er heilt øðrvísi at spæla í ár, tí spælið ikki koyrir so nógv upp á ein og sama leikara. Hetta gevur hinum leikarunum meira ábyrgd og gevur teimum eisini betri møguleikar fyri at gera seg galdandi á vøllinum. Og leygardagin sóust fleiri ábendingar um, at liðið so smátt hevur umstillað seg eftir missin av sterka bosniska leikaranum og venjaranum.

Fleyr-Mjølnir 1-3 (22-25, 20-25, 25-20, 17-25):

# Endiliga bragdaði hjá Mjølni

**Eftir tríggjar ósigrar á rað kom Mjølnir loksins á stigatalvuna við at vinna móti Fleyr**

FLOGBÓLTUR, KVINNUR
*Emil Lisberg Jacobsen*



*Loksins bragdaði hjá Mjølni, tá tær leygardagin vitjaðu hjá Fleyr, og sigur teirra var eisini fult uppiborin*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Eftir ivaleyst vánaligastu byrjan, sum besta kvinnuliðið hjá Mjølni nakrantíð hevur havt í eini landskapping, eydnaðist tað loksins klaksvíkingunum at vinna. Eftir tríggjar taptar dystir á rað vunnu tær móti Fleyr, sum nú hevur sama stigatal sum Mjølnir.

Úrslitið varð 3-1, og tað er ein góð mynd av dystinum. Mjølnir var betri, men Fleyr var nóg gott til at vinna eitt sett.

Mjølnir stýrdi tí mesta av dystinum. Ein av grundunum til tað var, at Sólvá Eystberg var flutt inn aftur á miðjuna og Berit Norðoy fór út aftur á kantin. Móti Drátti vikuna frammanundan hevði Sólvá spælt á kantinum - nakað sum hon ikki hevur roynt fyrr - og Berit á miðjuni, og tað riggaði ikki (Dráttur vann 3-1).

## Stóran týdning

Mjølnir legði stórt trýst á, og av tí sama fekk Fleyr ongantíð sítt álopsspæl at rigga nóg væl. Og júst tað bleiv kanska tann avgerandi munurin á liðunum.

Fyri Mjølnir hevði sigurin ómetaliga nógv at siga, og nú síggja tær ljósari uppá framtíðina. Tær hava verið í eini fyri tær óvanligari støðu við at tapa fleiri ferðir á rað, men kanska var sigurin leygardagin byrjanin til betri tíðir.

Hevði Fleyr vunnið, høvdu tær fingið luft niður til Mjølnir, men nú eru liðini jøvn í stigum á niðastu plássunum.

ÍF-Fram 2-3:

# Spennandi millum topp og botn

**Fram vann væntaði sigrin á ÍF, men oddaliði mátti veruliga stríðast móti meistarunum, sum nú tykjast vera um at koma fyri seg**

FLOGBÓLTUR, MENN
*Emil Lisberg Jacobsen*



*Fram vann móti botnliðinum leygardagin, menn tað var um reppið, at fuglfiriðingar gjørdu álvara av sínum hóttanum*
*Mynd: Aleksandar Djorovic*

Tað vóru oddaliðið og botnliðið, sum møttust á Kambsdali leygardagin, men sum dysturin gekk, sást lítið til, at liðini halda til í hvør sínum enda av stigatalvuni.

Fimm sett skuldu til, áðrenn Fram hevði tryggjað sær sítt 7. og 8. stig í kappingini móti ÍF, sum enn einki stig hevur fingið. Frammanundan var hetta ein dystur, sum Fram sá út til at fara at vinna uttan stórvegis trupulleikar. Teir høvdu longu vunnið móti øllum hinum liðunum í deildini. Og tá ÍF hevði tapt móti hesum somu trimum liðunum, so skuldi ikki verið so nógv at tosað um.

Men tíbetur gongur tað ikki altíð so sum roknað verður við - um so var hevði ikki verið neyðugt at spælt dystin...

## Eru ávegis

Fram er framvegis oddalið við fullum stigatali, og teir hava verið rímiliga sannførandi higartil, sjálvt um teir hava tapt sett móti øllum hinum liðunum. Og ÍF er enn stigaleyst, men avrikið móti Fram vísir, at teir ikki fara at verða fastir stiggevarar í vetur. Tað ræður bara um at vera meira støðugir enn higartil. Verða teir tað, eru fyrstu stigini ikki langt burturi.



TB-ÍF 3-1 (25-17, 25-27, 25-19, 25-15):

# TB misti eitt sett

**Fyri fyrstu ferð í kappingini tapti oddaliðið TB eitt sett, og fram til miðskeiðis í triðja setti fylgdi ÍF væl við. Men tað var týðiligt, at útlendsku leikararnir hjá TB gera mun**

FLOGBÓLTUR, KVINNUR
*Emil Lisberg Jacobsen*



*Hóast TB higar til hevði sópað alla mótstøðu til viks, so tóktust tær hjá ÍF ikki at hava nakra ovurhonds stóra virðing fyri oddaliðnum*
*Mynd: Áki Bertholdsen*

Oddaliðið TB vann sum væntað móti ÍF, eins og tær hava vunnið sannførandi móti øllum hinum liðunum í deildini, men munurin var, at hesaferð mistu TB-kvinnurnar eitt sett.

TB-kvinnurnar hava verið í einum flokki fyri seg higartil í kappingini, men ÍF hevur eisini víst gott spæl til tíðir og man í løtuni vera tað liðið í deildini, sum er næstbest fyri. Tí var ein møguleiki fyri, at tað kundi gerast eitt sindur spennandi í høllini í Trongisvági sunnudagin. Og leingi gekk tað eisini sera javnt á.

ÍF byrjaði dystin betur og legði seg eisini á odda í fyrsta setti. TB hevði trupulleikar við móttøkunum at byrja við, samstundis sum ÍF-kvinnurnar fingu nógvar bóltar væl upp frá gólvinum, og tað var greitt, at vitjandi liðið ikki legði nakað serligt í umdømið, sum vertirnir hava vunnið sær við at sópa alla mótstøðu í kappingini til viks.

Men so líðandi kom TB fyri seg og fekk yvirvág. Við støðuni 12-10 til ÍF vendi gongdin, og TB vann fyrsta settið 25-17. Tað fekk tó ikki ÍF at falla í fátt, og næsta sett bleiv sera javnt. Hvørki av liðunum slapp frá hinum, og til endans dró ÍF longra stráið og vann hetta settið 27-25.

## Ballónin brast

Nú stóð aftur á jøvnum í settum, og eftir at hava vunnið tíggju sett á rað hevði TB nú fyri fyrstu ferð tapt eitt sett. Teir umleið hálvthundrað áskoðararnir í høllini tóku á við heimaliðnum, men eitt sindur av óvissu kom nú eisini uppí. Sjálvsálitið hjá ÍF bleiv heldur ikki minni aftaná næsta sett, og í triðja settinum gekk eisini javnt á upp til 10-10. Men so brast ballónin. TB vann triðja sett 25-19 og vann eisini fjórða sett 25-15.

Bæði liðini mangladu leikarar, sum vanliga eru við, og dysturin vísti, at útlendsku leikararnir hjá TB gera stóran mun - ikki minst tá tað gongur javnt á. Men ÍF vísti, at TB-liðið kann vera til at tosa við.

### Støðan, meistaradeild kvinnur

| Støðan | Dystir | | | Sett | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Lið | leiktir | v | t | v | t | munur | Stig |
| TB | 4 | 3 | 0 | 12 | 1 | 11 | 8 |
| Dráttur | 4 | 2 | 2 | 8 | 8 | 0 | 4 |
| ÍF | 4 | 2 | 4 | 8 | 8 | 0 | 4 |
| Mjølnir | 4 | 1 | 3 | 6 | 10 | -4 | 2 |
| Fleyr | 4 | 1 | 3 | 4 | 11 | -7 | 2 |

### Støðan, meistaradeild menn

| Støðan | Dystir | | | Sett | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Lið | leiktir | v | t | v | t | munur | Stig |
| Fram | 4 | 4 | 0 | 12 | 6 | 6 | 8 |
| SÍ | 4 | 3 | 1 | 10 | 4 | 6 | 6 |
| Mjølnir | 4 | 2 | 2 | 8 | 8 | 0 | 4 |
| Fleyr | 4 | 1 | 3 | 6 | 9 | -3 | 2 |
| ÍF | 4 | 0 | 4 | 3 | 12 | -9 | 0 |

### Støðan, 1. deild kvinnur

| Støðan | Dystir | | | Sett | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Lið | leiktir | v | t | v | t | munur | Stig |
| KÍF | 3 | 3 | 0 | 9 | 2 | 7 | 6 |
| Mjølnir a | 3 | 2 | 1 | 8 | 5 | 3 | 4 |
| Fleyr | 3 | 1 | 2 | 6 | 6 | 0 | 2 |
| Dráttur | 1 | 1 | 0 | 3 | 2 | 1 | 2 |
| Nøvan | 2 | 1 | 1 | 3 | 4 | -1 | 2 |
| SÍ | 2 | 0 | 2 | 2 | 6 | -4 | 0 |
| Mjølnir b | 2 | 0 | 2 | 0 | 6 | -6 | 0 |

### Støðan, 1. deild menn

| Støðan | Dystir | | | Sett | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Lið | leiktir | v | t | v | t | munur | Stig |
| Fleyr | 3 | 2 | 1 | 8 | 3 | 5 | 4 |
| SÍ | 2 | 2 | 0 | 6 | 3 | 3 | 4 |
| NFL | 1 | 1 | 0 | 3 | 0 | 3 | 2 |
| Mjølnir a | 2 | 1 | 1 | 4 | 3 | 1 | 2 |
| ÍF a | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| ÍF b | 2 | 0 | 2 | 0 | 6 | -6 | 0 |
| Mjølnir b | 2 | 0 | 2 | 0 | 6 | -6 | 0 |

### Støðan, 2. deild kvinnur

| Støðan | Dystir | | | Sett | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Lið | leiktir | v | t | v | t | munur | Stig |
| Fossánes | 3 | 3 | 0 | 9 | 0 | 9 | 6 |
| KÍF a | 3 | 3 | 0 | 9 | 0 | 9 | 6 |
| KÍF b | 2 | 2 | 0 | 6 | 3 | 3 | 4 |
| Fleyr | 3 | 1 | 2 | 4 | 7 | -3 | 2 |
| SÍ | 3 | 1 | 2 | 3 | 6 | -3 | 2 |
| ÍF | 1 | 0 | 1 | 0 | 3 | -3 | 0 |
| Nøvan | 2 | 0 | 2 | 1 | 6 | -5 | 0 |
| Mjølnir | 3 | 0 | 3 | 2 | 9 | -7 | 0 |

### Støðan, 2. deild menn

| Støðan | Dystir | | | Sett | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Lið | leiktir | v | t | v | t | munur | Stig |
| Fram | 1 | 1 | 0 | 3 | 0 | 3 | 2 |
| Fleyr | 1 | 1 | 0 | 3 | 2 | 1 | 2 |
| Mjølnir | 3 | 1 | 2 | 5 | 6 | -1 | 2 |
| ÍF | 1 | 0 | 1 | 0 | 3 | -3 | 0 |

### Støðan, gentur 16

| Støðan | Dystir | | | Sett | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Lið | leiktir | v | t | v | t | munur | Stig |
| SÍ | 2 | 2 | 0 | 6 | 0 | 6 | 4 |
| Fleyr | 2 | 2 | 0 | 6 | 0 | 6 | 4 |
| TB a | 1 | 1 | 0 | 3 | 0 | 3 | 2 |
| TB b | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| ÍF | 1 | 0 | 1 | 0 | 3 | -3 | 0 |
| Dráttur | 2 | 0 | 2 | 0 | 6 | -6 | 0 |
| Nøvan | 2 | 0 | 2 | 0 | 6 | -6 | 0 |

### Støðan, dreingir 16

| Støðan | Dystir | | | Sett | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Lið | leiktir | v | t | v | t | munur | Stig |
| Fleyr | 1 | 1 | 0 | 3 | 0 | 3 | 2 |
| SÍ | 1 | 1 | 0 | 3 | 1 | 2 | 2 |
| TB | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Mjølnir | 2 | 0 | 2 | 1 | 6 | -5 | 0 |